

HEIMBYGDIN

– Eg havi altíð búð her, og tað ynski eg eisini at gera, sigur Annika Hansen á Langasandi

Mynd: Jens Kristian Vang

# Forering á hurðini

*Ein og hvør vil sjálvandi halda, at hansara heimbygd er tann besta í heimi. Og tað heldur Annika eisini, hóast Langasandur hvørki hevur arbeiðspláss, handil, skúla ella aðrir fasilitetir, sum fólk krevja í dag. Hóast hesi viðurskifti, er hon ikki í iva um, at Langasandur er besta stað á jørð:*

*– Her er hugnaligt og sera gott at búgva, tí øll kenna hvønn annan og vinalagið er gott.*

*– Ja, tú kanst koma til hús, og so hevur grannakonan bara hongt ein posa við nýbakaðum bollum á hurðalásið. Og so geri eg tað sama við hana eina aðru ferð.*